


# Oljuflúgving í 2014 týdning fyri flogvøllin í Vágum

Jan Müller

03.01.2014 - 23:39

Oljan.fo

Ongantíð hava so mong flogið um vøllin í Vágum sum í fjør. Men árið í ár kann gerast uppaftur betri, nú tveir leitibrunnar verða boraðir á landgrunninum og hetta fer at hava nógv virksemi við sær á flogvøllinum í Vágum.

Jákup Sverre Kass, stjóri í Vága Floghavn segði við Rás2 í dag, at hóast eingin oljuflúgving var í fjør í sambandi við boring, so vaks talið av ferðafólki um flogvøllin kortini. Og tá hugsað verður um, at boringarnar í ár fara at taka upp til eitt hálvt ár, so er greitt, at hetta fer at skapa nógv nýtt virksemi á flogvøllinum. Fólk skulu bæði flytast millum boripall og flogvøll við tyrlu og millum flogvøll og útlandið við flogfari.

So har vænta tey á flogvøllinum eina øking í ferðafólkatalinum uppá umleið 4,5% bara orsakað av leitivirkseminum í ár.